Páll á Reynatúgvu um eldraøkið:

# Samstarvsøki er fortreytin

**Landsstýrismaðurin í Almannamálum sær fyri sær, at eldraøkið verður býtt í eini 7-9 samstarvsøki kring landið. Hann sigur eisini, at tað er í tøkum tíma, at kommunurnar yvirtaka eldraøkið, tí tað hevur ligið í vanrøkt seinastu 25 árini. Eldraøkið verður betri stýrt í nærumhvørvinum**

ELDRAØKIÐ
*Páll Holm Johannesen*


*Landsstýrismaðurin í Almannamálum, Páll á Reynatúgvu, metir, at tíðin er búgvin at flyta eldraøkið út á kommurnar. Central staturin hevur ikki røkt eldraøkið á nøktandi hátt, og tí er skilabest, at eldrarøktin í framtíðin verður stýrd av kommununum, sigur landsstýrismaðurin*

*Mynd: Savnsmynd*

Eitt av høvuðsevnunum, ið varð umrøtt á ólavsøkuorðaskiftinum, var eldraøkið. Politisk semja er um, at eldraøkið 1.januar 2005 skal flytast út til kommunurar. Á fíggjarlógini fyri í ár er eldraøkið mett til at kosta góðar 230 millónir, so talan verður um ein kostnaðarmiklan post, ið kommunurnar skulu yvirtaka.

Drúgvasta kjakið í løgtinginum í farnu viku var um, hvørt núverandi kommunubygnaður við heili 48 kommunum megnar at yvirtaka eldraøkið.

Løgtingslimirnir Heðin Zachariassen, Andrias Petersen og Kristian Magnussen settu allir stórt spurnartekin við ætlanina hjá landsstýrinum við núverandi kommunubygnaði, og róðu fram undir, at fleiri kommunur vóru alt ov smáar at taka sær av sær av eldraøkinum.

## Samstarvsøki neyðug

Landsstýrismaðurin í Almannamálum, Páll á Reynatúgvu, tekur undir við kritikkinum.

– Tað er rættiliga órealistiskt, at eldraøkið verður lagt út í núverandi kommunubygnaði. Um talan verður um kommunusamanleggingar, skal eg ikki leggja meg í, tí tað er ein politisk telving. Í løtuni arbeiðir ein bólkur við umboðum fyri kommunurnar, Løgmálaráðið, Fíggjarmálaráðið og embætisfólki við einari ætlan, hvussu vit á besta hátt fáa eldraøkið flutt til kommunurnar, greiðir Páll á Reynatúgvu frá.

Landsstýrismaðurin vísir á, at arbeiðsbólkurin arbeiðir serliga við fíggjarliga og útjavningar partinum.

Á Almannaráðnum eru tey eisini í holt við at smíðja eina nýggja rammulóg fyri eldraøkið. Tá rammulógin er endaliga orðað, verður hon lagt fyri arbeiðsbólkinum til umrøðu.

Hóast Páll á Reynatúgvu ikki vil leggja seg út í kjakið um kommunusamanlegging, so heldur hann, at ein møgulig skipan kundi verið at býtt Føroyar í samstarvsøki. Hann nevnir eini 7-9 samstarvsøki, sum eina møguliga skipan.

– Í løtuni er heimarøktin býtt í seks øki, og ein líknandi skipan fyri eldraøkið kundi verði ein møguleiki. Eitt økið á støðd við Sandoynna kundi verið støddin fyri hvørt samstarvsøki, sigur landsstýrismaðurin í Almannamálum.

## Centralstaturin spælt fallit

Samgongan hevur grundgivið fyri at leggja eldraøkið út til kommunurnar, at barnaansingin hevur eydnast so mikið væl, at eldrarøktin eisini átti at verði ein uppløgd uppgáva hjá kommununum at umsitið.

Fólkafólkstingmaðurin, Heðin Zachariassen, vísti á í SVF fríggjakvøldið, at ein ikki kann samanbera eldraøkið og barnaansingarøkið, tí eldraøkið er væl dýrari enn barnaansingin at umsita.

Páll á Reynatúgvu heldur tó ikki, at størsti trupulleikin við at flyta eldrarøktina til kommunurnar liggur í tí fíggjarliga partinum.

– Tað er ikki tað fíggjarliga, sum er størsti trupulleikin. Spurningurin snýr seg hinvegin um tíð og fakligheit, sigur hann.

Hann sær fyri sær, at eldraøkið í framtíðini verður skipað, sum hon verður á Sandoynni. Á Sandoynni verður roynt at samantvinna økini heimarøktina og røktarheimini, og landsstýrismaðurin heldur, at framtíðarpolitikkurin á eldraøkinum átti at fylgt skipanini á Sandoynni. Hann vísir á, at tað er nógv greiðari við einum forumi fyri bæði heimarøktina og røktarheimini .

Landsstýrismaðurin sigur eisini, at tað er í tøkum tíma, at eldraøkið verður flutt til kommunurnar.

– Eftir mínum tykki, hevur centralstaturin spælt fallit seinastu 25 árini. Landið hevur ikki megnað at røkt eldraøkið á nøktandi hátt, og tískil er tað skilabest, at eldrarøktin í framtíðini fer frá at verða fjarstýrd til at verða nærstýrd, greiðir landsstýrismaðurin frá.

Spurdur um, hann ikki beinleiðis trýstir kommunurnar at samstarva ella at leggja saman við at leggja eldraøkið út til tær, svarar Páll á Reynatúgvu, at kommunurnar sjálvar vilja og krevja at fáa eldraøkið undir hond, eins og tær ynsktu barnaansingina.

Hann vísir á, at við at yvirtaka eldraøkið kunnu tær draga borgarar til sín, og ein kapping fer helst at stinga seg upp, um hvørjar kommunur fara at megna geva borgarum bestu tænastuna á eldraøkinum.

## Størsta stigið nakrantíð

Í løtuni eru kommunurnar, í tøttum samstarvi við landið, í holt við stóra útbygging á eldraøkinum. Áðrenn hálvtannað ár er runnið, er ætlanin, at í alt 123 nýggj røktarheimspláss skulu verða tøk.

– Henda bygging er størsta stigið á almannaøkinum nakrantíð, og nýbyggingin fer at minka nógv um stóra tørvin á eldraøkinum, fortelur Páll á Reynatúgvu.

Góð 60 røktarheimspláss verða bygd Norðstreymoy, Runavík og Havn, meðan helmingurin verður nýttur til sambýli. Tey verða bygd á Toftum, Gøta, Eiði og Leirvík verður bygt sambýli.

Eivind Jacobsen, býráðsformaður í Sjóvar kommunu:

# - Sandoy og Suðuroy fáa trupulleikar av eldraøkinum

**Býráðsformaðurin í Sjóvar Kommunu heldur, at tað er bert eitt eiti, at kommunurnar sjálvar sleppa at standa fyri eldraøkinum. Tað verður landið, ið fer at gera greiðar ásetingar, hvussu eldraøkið skal stýrast, og tí fáa vit ikki nakra ávirkan, sigur Eivind Jacobsen**

ELDRAØKIÐ
*Páll Holm Johannesen*


*Eivind Jacobsen, býráðsformaður í Sjóvar kommuna, væntar at trupulleikar fara at stinga seg upp við at flyta eldraøkið út til kommunurnar. Serliga væntar at Sandoyggin og Suðuroyggin fara at fáa tað torført*

Býráðsformaðurin í Sjóvar kommuna er rættiliga ivasamur við ætlanini hjá samgonguni, at kommunurnar skulu yvirtaka eldraøkið í 2005. Sjóvar kommuna er eftir føroyskum mátistokki ein miðalstór kommuna, og sambært Eivindi Jacobsen, so líður kommunan onga fíggjarliga neyð.

Hann sigur, at framvegis er óvissa um, hvussu ætlanin hjá samgonguni endaliga fer at síggja út, men at Sjóvar kommuna er til reiðar at yvirtaka eldraøkið, og kommunan fer at taka ímóti tí teimum treytum, landið áleggur teimum.

Hann leggur tó afturat, at hann væntar,at trupulleikar kunnu stinga seg upp kring landið við ætlanini hjá samgonguni.

– Eldraøkið er sera kostnaðarmikið, og nógvir pengar fara bara til umsiting, og tá so verður minni til røktina av teimum eldru Í seinasta enda verður tað tænastan hjá teimum eldru, ið tað kemur at raka, sigur býráðsformaðurin.

Eivind Jacobsen væntar serliga, at Sandoyggin og Suðuroy fara at fáa stórar trupulleikar av eldraøkinum.

– Fyri tað fyrsta eru kommunurnar á Sandoynni og Suðuroynni ikki so væl fyri, og í báðum økjum búgva nógv gomul fólk. Tá eldraøkið er kostnaðarmikið, fara fleiri pengar út av kassanum, enn tað koma inn, og tískil vænti eg, at tær kommunurnar fáa stórar fíggjarligar trupulleikar, sigur býráðsformaðurin í Sjóvar Kommunu.

## Framhaldandi stýrt av landinum

Býráðsformaðurin heldur, at tað er bert eitt eiti, at kommunurnar sjálvar sleppa at standa fyri eldrarøktini.

– Tað verða ikki kommunurnar, ið sleppa at ávirka eldraøkið, tí vit skulu fylgja greiðum ásetingum frá landinum. Tekur tú barnaansingina sum dømi, so vóru rættiliga greiðar ásetingar fyri, hvussu vit skuldu fyrihalda okkum. Eg vænti at tað verður sama søga við eldraøkinum, har vit fáa ein spennitroyggju á, og tí verður tað í veruleikanum landið, sum fer at stýra okkum, greiðir Eivind Jacobsen at enda frá.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Til Grímur Rasmussen á 65 ára degnum

Góði beiggi, tillukku við stóra degnum. Helt, eftir sum tað ikki ber til at halda dagin saman við tykkum, so at senda tær eina heilsu uppá henda mátan. Stuttligt at vera tætt knýttur at beiggja sínum. Sjálvt um tað eru tjúgu ár ímillum okkum, og lívið upp á nógvar mátar hevur myndað seg ymiskt hjá okkum, er bróðurbandið sera sterkt, og er hatta nakað eg virðismeti ómetaliga høgt. Hjá tær slapp pápi ikki heim aftur úr krígnum fyrr enn tú var sjey, hjá mær doyði mamma, tá eg var átta. Tú gekk tey fyrstu fetini norðuri á Stongunum, eg úti í Grótinum. Tú endaði á Jørundsgøtu og eg á Filipsoyggjunum – og álíkavæl – eru vit nær knýttir at hvørjum øðrum. Trúgvi tað skyldast, at tú hevur duga so væl at havt ein nógv yngri beiggja. Takk fyri.

Sat og hugsaði um, tá ið eg var smádrongur, og tú vart skipari á Stellu Karinu, bæði tí fyrru og seinnu. Minnist at vit plagdu at sleppa við, tá ið tit fóru út á Pollin at rætta kumpass. Havi ofta hugsa hvussu hatta hevur lýst leiklut tín, sum hin elsti av sysktunum – tú hjálpti okkum at rætta kumpass.

Hatta hevur verið sjónligt bæði í tí tímilia og andaliga. Í tí tímiliga hava vit sæð, óansæð hvussu tíðirnar vóru, so læt tú teg stýra eftir teimum somu meginreglunum. Tað var hvat var skeivt og rætt, sum taldi, ikki hvat var lættast í løtuni. Í tí andaliga hava vit sæð hetta í greiðu støðu tíni fyri Kristus. Bert ævinleikin fer at opinbera hvørja ávirkan hetta hevur havt á okkum systkjunum og familjum okkara.

Ein kundi skriva fleiri síður, men tað hevði tú nokk hildi verið í so amerikanskt, so eg skal gevast her og ynskja tær tillukku við degnum.

Cathy og Ben lata eisini heilsa.

**Jógvan Júst**



## Grímur Rasmussen 65 ár


*Grímur Rasmussen saman við systkjum sínum: f.v Jógvan Júst Rasmussen, Ásla Svensson, Magdalena Færø, Karin Jacobsen, og Grímur Rasmussen*

Mikudagin 13. august fyllir Grímur Rasmussen í Klaksvík 65 ár. Grímur er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Hann er sonur Durid, f. Justesen, úr Norðdepli, og Frimodt Rasmussen úr Grótinum í Klaksvík.

Grímur er útbúgvin stýrimaður og skipsførari. Hann fór fyrsta túrin til skips við Liljuni, sum 17 ára gamal. Síðani var hann við ymsum skipum. Sigldi í nógv ár hjá Stellu reiðarínum, bæði við línubátunum Stellu Mariu og Stellu Karinu. Hann var eisini fastur skipari á flakatrolaranum Stellu Karinu, frá tí at skipið bleiv bygt, til tað varð selt av landinum fyrst í 70-inum. Miðskeiðis í 70-inum lat hann, saman við øðrum, kraftblokkabátin Durid byggja. Hann var sjálvur skipari øll árini, inntil Durid var seld til Íslands í 1981. Grímur Rasmussen var skipari á rækjutrolaranum Karinu, hjá Trygva Laksafoss, tá ið Karina, sum tað fyrsta føroyska skipið fekk rækjur við Svalbard, í rakstrarverdum nøgdum, í 1981. Hetta skuldi vísa seg at verða eitt gott fund fyri rækjuflotan. Frá 1983 til 1985 førdi hann ísfiskatrolaran Skoraberg hjá J.F. Kjølbro.

Í 1985 legðist Grímur Rasmussen upp á land. Hann fór at fáast við aling. Hetta hevur hann fingist við líka síðani. Hann hevur arbeitt við øllum frá rognum til framleiðslu av liðugtvørum. Í dag er hann stjóri í alifelagnum East Salmon.

Grímur er giftur Klaru, f. Lervig, av Toftanesi í Leirvík. Tey eiga børnini. Sylvin, Durid og Frimodt.

Grímur brúkar nógva tíð saman við familjuni. Gongu ofta túrar í náttúruni, ofta saman við abbabørnunum. Hann hevur hønur og seyð sum honum dámar væl at fáast við. Hann hevur í nógv ár verði virkin í frítíðararbeiðinum í Betesda í Klaksvík.



## Leivur Guttesen 70 ár

13. august fyllir Leivur Fossdal Guttesen í Hoyvík 70 ár. Leivur er vestmenningur, sonur Jóhannu, f. Olsen, og Hans Guttesen, bæði úr Vestmanna. Sum 15 ára gamal fór hann í desember 1948 at sigla sum messudrongur við gamla vestmannatrolaranum, Gullfinni. Hann sigldi við Gullfinni í 1949, til hann fór í læru sum maskinsmiðjur á Vestmanna Skipasmiðju.

Í 1954 fór hann til Danmarkar at ganga á maskinmeistaraskúla. Eftir at hava tikið fyrra part av útbúgvingini sigldi hann við Mærsk báti í 1955-56. Síðan tók hann seinna partin av útbúgvingini og bleiv liðugur sum maskinmeistari í 1959. Tá fór hann at sigla sum maskinmeistari við vestmannatrolaranum, Jóannes Fonsdal.

Frá 1962-66 búði hann í Danmark og arbeiddi sum maskinmeistari á Lillemosegården, ið er eitt heim fyri evnaveik í Søborg. Í 1966 bleiv hann settur í starv sum maskimeistari á Landssjúkrahúsinum í Havn. Har arbeiddi hann til 1979, tá hann fekk starv sum maski,nmeistari á Fossáverkinum hjá SEV í Vestmanna. Hetta starv røkti hann til 1985. Frá 1985-88 var hann verkførari á verkstaðnum hjá Demich í Havn. Frá 1988 til hann legði frá sær fyri aldur, arbeiddi hann sum maskinmeistari hjá Fjarhitafelagnum, sum veitir hita til størsta partin av húsunum í Hoyvík.

Leivur giftist í 1960 við Maritu, f. Andreasen, bioanalytikara, av Strondum. Marita lærdi til bioanalytikara í Keypmannahavn frá 1956-59 og arbeiðir á Landssjúkrahúsinum. Tey eiga fýra børn, tey eru: Sunnuva, sum býr í Fuglafirði, Gunnar sum býr í Danmark, Helgi,sum býr í Havn og Poul, sum býr í Skotlandi. Marita og Leivur bygdu sær hús í Havn í 1973, har tey búðu til tey til 1999, tá tey seldu húsini og bygdu sær eini minni hús í randarhúsunum inni á Gøtu í Hoyvík. Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni uttanlands.

## Lena Lamhauge farin



Týsmorgunin 30. juli andaðist Anna Malena Lamhauge, vanliga nevnd Lena, í Søldarfirði, 90 ára gomul.
Lena búði heima líka til hon andaðist, og helt hon sjálv hús og var heilt andsfrísk líka til tað síðsta. Hon fylgdi við øllum sum fyrifórst, bæði hjá børnum, ommubørnum og í samfelagnum annars.

Lena var gift við Samuel Jacob Lamhauge úr Lamba, og búsettust tey í Søldarfirði. Maðurin doyði í 1983, og var hon einsamøll í 20 ár.

Lena var dóttir Peter og Annu Danielsen, sum høvdu eitt kongsfesti og handil í Søldarfirði.

Hesi bæði arbeiði tóku Lena og Samuel Jacob yvir, tá foreldur hennara løgdu frá sær.

Mamma Lenu, Anna, var dóttir Elsebeth Christine og Lassen Weihe av Selatrað.

Pápi Lenu, Peter, var sonur Anne Malene og Daniel Danielsen (vanliga nevndur sýslumaðurin) úr Søldarfirði.

Lena og Samuel Jacob fingu trý børn, har tað fyrsta, ein dóttir, doyði av lungnabruna hálvt ára gomul í 1944, og tveir synir, Petur Alberg og Eyðfinn.

## Dagurin

**13. august. Hippolytos,** deyður í umleið 235. Helst ein grikki, sum gjørdist ein av teimum best kendu kristnu rithøvundunum í Róm í 3. øld. Hann var tikin av døgum við at verða slitin millum hestar, sum navn hansara sipar til.

*Rasmus Rasmussen (á Háskúlanum) varð føddur hendan dagin í 1871.*